## AB tapti

AB fyrireikar seg í hesum døgum til komandi kappingarár. Fyrsti dysturin av týdningini verður 12. august, tá liðið vitjar hjá ÍF Føroyum í donsku steypakappingini. AB spældi fyrsta venjingardystin í summar um vikuskiftið. Og á heimavøllinum tapti teir grønu úr Gladsaxe við 2-1 móti FC Vestsjælland.



## Malsom verður við

Í farnu viku skifti Sam Malsom úr B36 til íslendska Þrótt, sum er botnproppur í bestu deildini í Íslandi. Þróttur fær í kvøld vitjan av Breiðabliki, sum er á sjeynda plássinum, og við í hópinum hjá heimaliðnum er Sam Malsom. Tískil er líkt til, at onglendingurin fer at spæla sín fyrsta dyst fyri felagið í kvøld.



Hafsteinn Ægir Geirsson á veg gjøgnum Vágsbygd leygardagin. Ikki er sørt, at vinnarin síðstu fýra árini her sær eitt sindur uppgevandi út

Mynd: Hilmar Jan Hansen/Einslistir

# Mótstøðan ov stór

**Hafsteinn Ægir Geirsson, sum tey fýra undanfarnu árini hevur vunnið Statoil Kring Føroyar, brúkti ongar umberingar, tá hann staðfesti, hví hann ikki aftur í ár stóð ovastur á sigurspallinum**

SÚKKLING
*Hilmar Jan Hansen*
*einslistir@kallnet.fo*

Tríggjar teir fyrstu dagarnar líktist súkklukappingin sær sjálvari, tí hóast danski A-súkklarin, Troels Toftager Nielsen, var drúgvastur í teimum báðum einkultstartunum í Klaksvík og heima á Sandi, vóru bæði Torkil Veyhe og Hafsteinn Ægir Geirsson við heilt har frammi.

Tað sá eisini út, sum tað plagdi, tá teir báðir komu saman um málstrikuna í Saltangará hósdagin – men við Hafsteinni nakrar fáar sentimetrar frammanfyri.

Í Suðuroynni leygardagin gjørdist tað føroyska liðið, ið streyk avstað við øllum og knústi alla mótstøðu, og sjálvt ikki Hafsteinn fekk blandað seg uppí, men var hálvantølvta minutt aftan fyri Torkil Veyhe og Guðmund Joensen.

– Eg skal vera tann fyrsti til at viðganga, at hinar fýra kappingarnar hjá mær í Føroyum hava verið stuttligari enn henda. Men hesa ferð var einki at gera hjá mær, tí Torkil og Guðmundur vóru snøgt sagt ov sterkir, segði Hafsteinn, tá alt var liðugt seinnapartin í gjár.

Hann brúkti ongar umberingar, men rósti teimum báðum fremstu í kappingini treytaleyst, hóast hann millum annað kundi fortalt, at hann kanska var nakað eymur í beinunum, tí hann beint undan Statoil Kring Føroyar hevði verið við í harðari og drúgvari kapping í Íslandi – sum hann vann…

– Her var eingin ivi um, at tað var best liðið sum vann kappingina hesa ferð, men tað tekur ikki hugin frá mær – heldur tvørturímóti. Vónandi kann eg koma sterkt aftur, tá nýggj kapping verður aftur her um eitt ár, segði Hafsteinn Ægir Geirsson, ið sjálvur triði var við á liðnum, HFR Team, ið gjørdist næstfremst í liðkappingini.

# Mundi endað galið

**Heima á Sandi var tað um reppið, at vanlukka spurdist burturúr, tá ein bilur brádliga sneiddi inn fyri ein av súkklarunum, sum kom við fullari ferð**

SÚKKLING
*Hilmar Jan Hansen*
*einslistir@kallnet.fo*

Tá súkklað verður í kapping, er ferðin gjarna nógv hægri, enn vit eru von við, tá talan er um vanliga súkkling. Tí kunnu kappsúkklararnir koma óvart á fólk í ferðsluni, ið ikki varnast, at ferðin er nógv hægri. Ein støða í einkultstartinum heima á Sandi fríggjadagin mundi endað galið, um súkklarin ikki var so snarráðin og kvikur, at hann í avgerandi splittsekundinum fann einasta útvegin í støðuni.

– Eg kom koyrandi frá bygdini og ímóti Statoilstøðini, tá tveir bilar stóðu á vegnum. Júst sum eg yvirháli, sneiddi annar inn á støðina og rakti bakhjólið hjá mær við kúfangaranum, sigur Christian Guttesen, sum er ein av royndastu súkklarunum í kappingini – og tað gjørdi kanska munin.

– Har vóru bara tveir møguleikar, tí misti eg tamarhaldið á súkkluni, rendi eg beint í bussin, sum stóð við vegjaðaran, og hinvegin kundi eg royna at stýra millum fólkini, sum tóku tíð og stóðu við síðuna av bussinum. Tíbetur sá eg eitt hol millum fólkini og tók kjansin – og tað gekk akkurát.

Lukkutíð fyri Christian, slapp hann snikkaleysur frá hesum óhappinum, ið hendi, meðan hann hevði góða ferð á súkkluni, samstundis sum hann so at siga onga tíð hevði til at umráða seg í.

– Nú gekk so væl, at eg ongantíð steðgaði, men kundi halda fram. Tó var eg so skakkur av hendingini, at eg ristist og skalv í eina góða løtu og slett ikki fekk konsentrerað meg um súkklingina, sigur Christian.

– Beint aftaná mundi eg yvirsæð eitt sving, tí eg slett ikki var komin fyri meg, so tað, ið ikki var hent áðrenn, mundi hent aftaná. Hetta var skakandi, men til alla lukku slapst undan, at nakað álvarsligt hendi, tí her var veruliga nær við, at tað endaði heilt galið.

### Statoil Kring Føroyar – einstaklingakapping

| | | | Klaksvík 8 km | | Eysturoy 115 km | | Sandoy 27 km | | Suðuroy 77 km | | Samlað tíð 227 km |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Nr. | Navn | Felag | Tíð | Nr. | Tíð | Nr. | Tíð | Nr. | Tíð | Nr. | |
| 1 | Torkil Veyhe | TSF | 0:10:30 | 2 | 3:13:06 | 2 | 0:36:30 | 2 | 2:36:03 | 1 | 6:36:09 |
| 2 | Guðmundur Joensen | FTF | 0:10:57 | 6 | 3:13:09 | 7 | 0:37:23 | 4 | 2:36:05 | 2 | 6:37:34 |
| 3 | Árni Már Jónsson | HFR | 0:10:51 | 5 | 3:13:09 | 4 | 0:37:50 | 5 | 2:37:44 | 3 | 6:39:34 |
| 4 | Gunnar Dahl-Olsen | TSF | 0:11:22 | 9 | 3:13:09 | 5 | 0:38:39 | 7 | 2:40:02 | 4 | 6:43:12 |
| 5 | Hafsteinn Ægir Geirsson | HFR | 0:10:32 | 3 | 3:13:06 | 1 | 0:36:40 | 3 | 2:47:33 | 5 | 6:47:51 |
| 6 | Troels Toftager Nielsen | ABC | 0:10:22 | 1 | 3:13:06 | 3 | 0:35:26 | 1 | 2:50:12 | 6 | 6:49:06 |
| 7 | Gunnlaugur Jónasson | HJM | 0:10:44 | 4 | 3:13:09 | 9 | 0:37:56 | 6 | 2:55:39 | 8 | 6:57:28 |
| 8 | Andrass Joensen | FTF | 0:11:44 | 13 | 3:13:09 | 8 | 0:40:17 | 11 | 2:55:39 | 7 | 7:00:49 |
| 9 | Sigurgeir Agnarsson | HJM | 0:11:18 | 8 | 3:13:09 | 11 | 0:39:24 | 8 | 2:59:59 | 11 | 7:03:50 |
| 10 | Pétur Ragnarsson | HFR | 0:11:16 | 7 | 3:13:09 | 14 | 0:39:50 | 9 | 2:59:59 | 9 | 7:04:14 |
| 11 | Hlöðver Sigurðsson | HFR | 0:11:41 | 12 | 3:13:09 | 10 | 0:41:34 | 13 | 2:59:59 | 10 | 7:06:23 |
| 12 | Morten Hansen | TSF | 0:11:27 | 11 | 3:13:09 | 6 | 0:39:58 | 10 | 3:04:37 | 12 | 7:09:11 |
| 13 | Sverri Mohr Edvinsson | TSF | 0:11:24 | 10 | 3:13:09 | 12 | 0:42:55 | 17 | 3:05:13 | 13 | 7:12:41 |
| 14 | Wim De Dobbeleer | HFR | 0:11:57 | 14 | 3:13:09 | 13 | 0:40:56 | 12 | 3:07:45 | 15 | 7:13:47 |
| 15 | Áslakkur Nesá | SCR | 0:12:04 | 15 | 3:20:55 | 17 | 0:41:40 | 15 | 3:07:30 | 14 | 7:22:09 |
| 16 | Súsanna Skylv Sørensen | FTF | 0:12:25 | 17 | 3:20:55 | 16 | 0:41:39 | 14 | 3:25:02 | 17 | 7:40:01 |
| 17 | Jóhann Brend | CKK | 0:12:07 | 16 | 3:14:15 | 15 | 0:42:53 | 16 | 3:35:17 | 19 | 7:44:32 |
| 18 | Christian Guttesen | FCK | 0:12:40 | 18 | 3:32:50 | 18 | 0:46:05 | 20 | 3:24:46 | 16 | 7:56:21 |
| 19 | Jógvan Djurhuus | TSF | 0:12:47 | 19 | 3:32:54 | 20 | 0:45:32 | 18 | 3:34:44 | 18 | 8:05:57 |
| | **Ikki gjøgnumført** | | | | | | | | | | |
| | Evald Rasmussen | TSF | 0:12:51 | 20 | 4:10:00 | 22 | 0:46:39 | 21 | Ikki á mál | | |
| | Jákup Johansen | TSF | 0:13:27 | 22 | 3:55:21 | 21 | Ikki við | | Ikki við | | |
| | Hans Egholm | TSF | Ikki við | | 4:10:00 | 22 | Ikki við | | Ikki við | | |
| | Lars K. Thomsen | CKK | 0:13:13 | 21 | 3:32:54 | 19 | 0:45:36 | 19 | Ikki á mál | | |
| | Marin Ennistein Heinesen | TSF | 0:14:33 | 23 | 4:10:34 | 24 | 0:50:11 | 22 | Ikki á mál | | |
| | Henry Berg | TSF | 0:14:52 | 24 | 4:14:22 | 25 | 0:54:02 | 23 | Ikki á mál | | |
| | **Unglingabólkur** | | | | | | | | | | |
| | Jóanis Albert Nielsen | TSF | 0:15:36 | 1 | Ikki við | | 0:36:23 | 1 | Ikki við | | |

# Ov vánaligt veður

**Tíðliga sunnudagin var so mikið ringt veður, at seinasti teinurin, sum var Streymoyggin við sínum 109 kilometrum, ikki varð súkklað. Seinni batnaði veðrið tó munandi**

SÚKKLING
*Hilmar Jan Hansen*
*einslistir@kallnet.fo*

Eftir leygardagin, tá súkklukappingin var darvað av vánaligum veðri í Suðuroy, var gjørt av at avlýsa seinasta teinin sunnudagin, sum var úr Tjørnuvík til Havnar umvegis Saksun og Gomluræet. Veðrið var fyrr um dagin so vánaligt, at yvirdómarin, Geyr Gilsteinsson, ikki helt tað vera ráðiligt at gjøgnumføra ein veðurharðan dag aftrat.

– Vit vóru úti á pørtum av rutuni og forhoyrdu okkum annars um veðrið aðrastaðni, og tá vit søgdu súkklarunum, at vit ætlaðu at avlýsa teinin, mótmælti eingin av teimum. Í staðin valdu vit bara at taka eina paradusúkkling í Havn og á Argjum, sum so endaði við trimum umførum í Gundadali, men uttan at vera kapping, sigur hann.

Tað vísti seg annars, at veðrið batnaði nógv út á dagin, og óivað hevði borið til at gjøgnumført seinasta teinin eisini, men avgerðin var tikin, so har gjørdist einki við tað. Helst hevði tað eisini sítt at siga, at avgerðin í bæði einstaklinga- og liðkappingini longu var fallin, so har hevði ikki verið tað stóra at kappast um kortini.

– Tá hugt verður at veðrinum, sum tað bleiv seinnapartin, var tað kanska eitt sindur spell, at kappingin var avlýst fyrr um dagin, men tað er lætt at siga aftaná, segði Gunnar Dahl-Olsen, sum eisini fekk viðhald frá Torkil Veyhe:

– Ta løtuna, tá avgerðin var tikin, sá tað einki út, men seinni var veðrið so gott, at tað saktans kundi verið súkklað. Kappingin kundi kanska verið útsett ein tíma, men nú bleiv tað so, sum tað bleiv. Høvdu bara ein ella tveir minuttir verið á muni, hevði tað kanska verið verri at avlýst.